# Smart rætt í ongamannalandi

**Jústinus Leivsson Eidesgaard**
*Sosialurin, Hellurnar*



*Lendingin, sum nú er rætt tveir dagar um árið, liggur fyri handan Skarð, á Buktini ella við Oyndarfjørð, alt eftir hvar tú er ættaður. Mynd: Jústinus*
*Leivsson Eidesgaard*

Fríggjadagin vóru rustamenn á fjalli í várgongu.

Rustahagin gongur frá lendingini á Hellunum og í ánna miðskeiðis í Góðadali sunnanfyri Nestanga í Oyndarfirði. Hagin hoyrir undir Fuglafjørð. 19 manns vóru á fjalli hendan dagin og tað gekkst væl at reka. Teir fóru tíðliga um morgunin og vóru í rætt nakað aftan á døgurða.

Rustamenn hava fingið nýggja rætt, og hendan er bara at síggja teir dagar teir eru á fjalli. Hinar dagar á árinum er hon tikin niður, pakka saman og goymd av vegnum í eini neystatoft á Hellunum

– Hetta er heimsins smartasta rætt. Fyrr rættaðu við úti á Rivinum og har var ongin vegur til. Strídnasta arbeiðið var aftan á fjallgongu at fáa seyðin heim. Nú hava vit so fingið hesa mobilu rætt ,og tá vit hava brúk fyri henni, seta vit hana upp á lendingini og her er laga manni at fáa seyðin upp í bilar, sigur Tórur Samuelsen úr Fuglafirði. Hann er líka sum stjóri í Rustahaganum ella bossur sum onkur tók til.

Hann er eisini røktingarmaður, og tað er ein meira vanligt føroyskt orð.

Neyðugt er at fáa seyð upp í bilar, tí hóast meginparturin av haganum liggur í Oyndarfirði og Hellurnar er næsta bygd, so eru tað serliga fuglfirðingar sum eiga í haganum. Hendan dagin vóru umframt fuglfirðingar eisini onkur av Hellunum, ein einstakur úr Oyndarfirði og onkur úr Havn eisini.

## Ringur vetrarhagi

Rustin er ringur vetrarhagi, tað er eisini ein óhøgligur hagi við ongum undirhaga av týdningi. Um veturin er hagin tómur. Seinnu árini hava teir tikið allan seyðin inn um veturin. Tað hevur givið úrslit. Miðalvektin er farin fleiri pund upp og í dag við eitt gott lamb úr Rustahaganum yvir 32 pund.

– Óhøgligur er hann, men smakkurin. Vit eiga hagabesta kjøtið her á leið, sigur Tórur við einum smíli. Hann er matglaður og er errin av góða kjøtinum av Rustini.

Eitt evni, sum er til støðuga ósemja í føðingardøgum og øðrum veisluhaldi her á leið er um kjøtið á Rustini er betri enn tað í Skarðhaga.

Eigararnir í hesum báðum høgum, og teir eru nógvir, tí alt er ogn, tvíhalda um at teirra kjøt er best. Sjálvur eri eg uttanveltaður og helli til rustakjøtið. Rætt skal vera rætt, Skarðhagi er nógv størri og har eru hagagóð pláss í erva og kanska minni góð í neðra í stóra undirhaganum, sum heilt vantar í Rustahaganum.

– Fyrr var tað soleiðis, tá seyðurin gekk úti um veturin, at ring ár fór ein stórur partur fyri einki og góð ár, tá kom sjálvandi meira undan. Nú fáa vit veldiga góðan seyð og miðalvektin kann koma upp móti 36 pundum hjá einstøkum eigara, sigur Tórur Samuelsen.

## Ongamannaland

Menn standa úti á lending í nýggju rættini og hyggja eftir lombunum, sum einki skilja av øllum forstýrilsinum í morgun, nú tey eru órógvaði í teirra einasta strevi at súgva, eta og spæla.

Hóast hagin er trygt plaseraður á syðru síðu á Oyndarfirði, við Nestanga yttst, so kunnu teir ymisku eigararnir úr Fuglafirði, av Hellunum í Oyndarfirði og aðrastaðni við ikki rættuliga semjast um hvar Rustahagi liggur.

Fuglfirðingar ómaka sær ikki eingang at siga Oyndarfjørð. Teir kanna bara staðin í besta kolonistíli Fyri handan Skarð. Á samahátt sum bretar kallaðu teirra hjálond fyri Overseas. Hellumenn hava finnið eina millumleið sum eisini útmanurerar Oyndarfjørð. Teir kalla fjørðin fyri Buktina. Og oyndfirðingar halda fast við gamla navnið og blíva við at gremja seg um, at ein garðibóndi einaferð í fyrndini lat Rustina til Fuglafjarðar í eini brúðargávu, ella heimafylgju. Denn skálkur hann var. Teir høvdu nokk allir sum ein vilja átt Rustina.

# Nýggjar tíðir

**Nú várfjøllini verða gingin, eru eisini broytingar at síggja í aldargamla fjallgongumynstri okkara. Fólk ferðast kring knøttin at royta við maskinu**

VÁRGONGA
*Edvard Joensen*



*i nýggja háttinum verður seyðurin rakaður tætt at skinninum. Tað meta summir at kunna skaða seyðin, so hann sleppist*
*Mynd: Edvard Joensen*

Fjallgongan broytist eisini við tíðini. Nú ganga fleiri á fjall um kvøldið. Klippa inni og hava fremmandar menn at gera arbeiðið.

Tað er ikki óvanligt, tá ferðast verður eftir vegunum hesar dagarnar, at síggja heilar gongur kring seyðahúsni. Fleiri bilar standa við vegin. Einki fólk er at síggja. Men ljós í húsunum heilt seint á kvøldið.

Her eru menn farnir á várfjall. Einir tveir tríggir hjálparmenn, sum ganga klipparanum til handa.

Og klipparin er komin hinumegin knøttin, siga teir frá. Úr New Zeelandi ella Australia, tó at hann helst býr í Danmark.

Væl útgjørdur við motorsaksi, sum klippir við slíkari ferð at fáur hevur sæð slíkt her á landi.

Hetta kemur væl við hjá teimum, sum fyrr skuldu mynstra stóra manning heilar dagar á fjalli. Men ikki skerst burtur, at okkurt av tí gamla er burtur. Og heldur hetta fram, er hesin parturin av fólkalívinum farin.

Men kortini eru summi, sum halda, at soleiðis fer ikki at ganga. Tey siga stutt og greitt, at hetta, sum nú verður gjørt, er ikki gott fyri seyðin. Hann verður kokurakaður. Gongur kannkollutur og verður útsettur fyri kulda, sum kann gera, at ærnar sleppast. Tá er lítið vunnið, halda hesir, sum vilja halda gamlan sið í hevd.

Ein teirra, Sosialurin hevur tosað við, og sum ikki nýtir nýggja háttin, sigur, at hann metir, at hetta fer ov illa við ullini.

Er filingin góð, er nýggj ull vaksin útaftur, sum so verjir seyðin móti veðri og øðrum, tá roytt er. Vanligt er so at royta ella klippa tætt at gomlu ullini, og seyðurin fer so avstað aftur við nýggju ullini.

Nú verður rakað tætt at skinninum Tískil er eingin nýggj ull, tá slept verður aftur. Og heimildamaður okkara ivast í, um hann vil bjóða kriatúrum sínum slika viðferð.



*Skilligur munur er á, har ullin er roytt eftir filing, og har rakað er*
*Mynd: Edvard Joensen*



# Silberbauer í donsku miðlunum

**Framvegis óváttaðu tíðindini í Sosialinum og á portalinum um Michael Silberbauer og hansara rúsdrekkakoyring í Havn seinasta mikukvøld tóku ikki langa tíð at náa danska fjølmiðlaheimin, og "Silber" er nú í fokus í Danmark**

RÚSDREKKA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*Framvegis er einki váttað um Silberbauer og hansara rúsdrekkakoyring í Havnini seinasta mikukvøld, men donsku miðlarnir hava í dag kastað ljós á málið um Silberbauer. Talan er sostatt um bíðistøðu*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Telefonirnar kimaðu í miðlahúsinum á Argjum mánadagin seinnapart og týsdagin fyrrapart, tá tað fréttist í danska fjølmiðlaheiminum um stjørnuna í FC Keypmannahavn, Michael Silberbauer, og hansara rúsdrekkakoyring mikukvøldið í Tórshavn.

Ekstrablaðið endurgevir í dag Sosialin á forsíðuni, Tipsblaðið er farið undir at viðgerða málið og møguligar avleiðingar fyri Silberbauer, á FCK-heimasíðuni verður dúgliga kjakast um Silberbauer og hendingina, portalurin mánadagin seinnapart bar boð um, og TV3 hevur eisini sett seg í samband við Sosialin um hendingina í Havnini.

Framvegis er einki váttað frá FC Keypmannahavn ella føroysku løgregluni, og ákærarnir á fútaskrivstovuni í Havn hava einki hoyrt um málið. Tí er tað framvegis ein opin spurningur og ein óváttað søga, at Silberbauer varð tikin av løgregluni við ov høgari promillu.

## Kúrr FCK-leiðsla

Bæði TV3 og Tipsblaðið hava sett seg í samband við Niels Christian Holmstrøm, ítróttarstjóra í FC Keypmannahavn, men hann sigur framvegis, at søgan ikki er sonn, eins og hann gjørdi við Sosialin mánamorgunin, eftir at hann hevði tosað við kroysta høvuðspersónin sjálvan.

Annars siga danskir tíðindamenn frá TV3 og Tipsblaðnum við Sosialin, at FCK-leiðslan heldur lágan profil og er kúrr, og svarini frá leiðsluni eru sera avmarkað og stutt, hóast teir halda fast um, at Silberbauer ikki er tikin fyri rúsdrekkakoyring.

## Rætting

Í týsdagssosialinum og á portalinum mánadagin varð sagt, at ein blóðroynd varð gjørd av Silberbauer (um tað nú er hann) mikukvøldið, tá hann varð tikin í Havnini, og at royndin staðfesti ov nógv alkohol.

Hetta er ikki rætt. Mannagongdin er nevniliga hon, at viðkomandi fyst skal blása í eitt alkometur, og um henda royndin vísir ov høga promillu, verður viðkomandi tikin á støðina, og har tekur lækni eina blóðroynd, sum verður send til Retskemisk Institut í Keypmannahavn. Úrslitið av hesi royndini kemur umleið tvær vikur seinni aftur til Føroya, og ikki fyrrenn tá fyriliggur nakað svar. Í tíðindunum í gjár vórðu teknisku orðini sostatt býtt um og vóru misvísandi.

## Bíðistøða

Samanumtikið verður nú bíða eftir, hvat hendir í málinum um møguligu rúsdrekkakoyringina hjá Silberbauer. Hvørki FCK ella føroyska løgreglan hava váttað nakað fyri Sosialinum ella donsku fjølmiðlunum, men talan er um eitt politimál, sum verður viðgjørt í Føroyum. Væntandi verður meiri at frætta næstu dagarnar um Silberbauer, nú donsku fjølmiðlarnir hava tikið málið upp og leggja alsamt trýst á FC Keypmannahavn.

# Flutningsfeløg takka Bárði Nielsen

**Í sambandi við nýggju e-toll skipanina hjá Toll og Skatt var ætlanin, at føroysku flutningsfeløgini ikki longdur kundu tollgreiða vørurnar fyri sínar kundar, men eftir eina áheitan frá flutningsfeløgunum setti fíggjarmálaráðharrin fót fyri hesari ætlan**

TOLLGREIÐSLA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, fær rós fyri skjótt og gott arbeiði frá føroysku flutningsfeløgunum.*

Tann 1. juli í ár kom tann nýggja e-toll skipanin hjá Toll og Skatt í gildi. Skipanin virkar á tann hátt, at føroyskir innflytarar nú sjálvir kunnu avgreiða síni tollpappírir umvegis telduna. Samstundis skuldi nýggja skipanin føra við sær, at tað ikki longur var gjørligt hjá flutningsfeløgunum at tollgreiða vørur fyr0i sínar kundar.

## Ein gomul tænasta

Hetta við at tollgreiða vørur fyri sínar kundar, er ein tænasta, sum føroysku flutningsfeløgini hava veitt í mong ár, sigur stjórin á Safari Transport, Knút Lützen, ið gjørdist illa við, tá ið tað fréttist, at Toll og Skatt ætlaði at forða fyri, at flutningsfeløgini kundu veita hesa tænastu.

Knút Lützen greiðir frá, at flutningsfeløgini settu seg í samband við Toll og Skatt fleiri ferðir fyri at greiða teimum frá støðuni, men har var einki at gera, og víst var til ymiskar lógir. Stjórin á Safari Transport sigur, at ætlaninar hjá Toll og Skatt eisini høvdu ført við sær, at summir innflytarar fóru at fáa trupulleikar, tí fleiri av teimum duga ikki at tollgreiða sínar vørur sjálvir, sigur hann.

## Fíggjarmálaráðharrin gjørdi skjótt av

Tá ið tað gjørdist greitt hjá flutningsfeløgunum, at einki kom burturúr at tosa við Toll og Skatt, var avgjørt at seta seg í samband við fíggjarmálaráðharran, Bárð Nielsen, og tað vísti seg at verða ein skilagóð avgerð. Eitt bræv, har greitt var frá støðuni hjá flutningsfeløgunum, var latið skrivaranum hjá Bárði Nielsen seint ein seinnapart eftir, at fíggjarmálaráðharrin var farin av skrivstovuni.

Flutningsfeløgini væntaðu, at nú var neyðugt at bíða í eina tíð, áðrenn nakað var at frætta aftur úr fíggjarmálaráðnum, men so var ikki. Knút Lützen sigur, at longu tíðliga morgunin eftir kom yvirtollarin framvið skrivstovuni hjá Safari Transport, og hann segði fyri Knúti, at nú vóru boð komin úr fíggjarmálaráðnum um, at tað framvegis skuldi verða gjørligt hjá flutningsfeløgunum at tollgreiða vørur fyri sínar kundar. Knút Lützen sigur, at hann gjørdist púra ovfarin av, at fíggjarmálaráðharrin hevði gjørt so skjótt av, og at hann beinan vegin hevði skorið ígjøgnum og gingið ynskinum hjá flutningsfeløgunum á møti. Hann sigur, at flutningsfeløgini eru Bárði Nielsen sera takksom fyri at hava arbeitt so skjótt, og tað skal landsstýrismaðurin hava rós fyri.

## Nýggja skipanin virkar væl

Enn eru føroysku flutningsfeløgini ikki komin við í nýggju e-toll skipanina, men Knút Lützen sigur, at tað koma tey í oktober mánaða í ár. Tískil avgreiða flutningsfeløgini framvegis tollpappírini hjá viðskiftafólkum sínum á gamlan hátt.

Okkurt hevur verið at hoyrt um, at nýggja skipanin ikki skuldi virka so væl, men tað kennir stjórin í Safari Transport einki til. Tvørturímóti sigur hann seg bara hava frætt, at skipanin virkar serstakliga væl.